## Cannavaro heim til Napoli

Verjuskansin hjá Real Madrid og Italia og heimsins besti spælari í 2006, Fabio Cannavaro, sigur seg ætla at enda glæsiligu yrkisleið sína í Napoli. Sáttmálin hjá Cannavaro við Real Madrid endar komandi summar, og sambært umboðsmanni hansara, Gaetano Fedele, er tað als ikki ósannlíkt, at Cannavaro longu í januar fer undir samráðingar við barndómsfelagið.



## Klitschko stjól beltið

Leygarkvøldið skal Vitali Klitschko – stóribeiggi at Vladimir Klitschko – skal leygardagin stríðast móti WBC-heimsmeistaranum, Samuel Peter. Men longu tá boksararnir skuldu vigast í gjár, tók Klitschko fyrsta stikkið, tá hann tók HM-beltið úr føvninginum á Peter, sum gjørdist illur av hendingini. Og tá báðir so togaðust um beltið, slepti Klitschko brádliga, soleiðis at Peter fór bóltandi afturav. – Hatta fært tú afturlønt leygarkvøldið, segði heimsmeistarin, táhann í øðrini fór avstað. Og umboðsmaður hansara, Dino Duva, legði afturat, at Vitali væl kann fyrireikað seg til at fáa beltið upp í ein ávísan likamspart.



*Komandi landsdysturin hjá Eysturríki vekir einvíst ring minni hjá Josef Hickersberger. Hann stóð á odda fyri liðnum í Landskrona í 1990, og hann hevði ongar ætlanir um at leita sær eina endurtøku av teirri eyðmýkingini – nú 18 ár seinni*

*Mynd: Polfoto/AP*

# Føroyar vóru ein orsøk

**Bara tað at hyggja at sjónvarpi leygardagin krevur fyrireiking, sigur Josef Hickersberger í samrøðu, sum varð gjørd við APA-tíðindastovuna fyrr í vikuni**

FÓTBÓLTUR

*Jákup Mørk umsett frá APA*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað eru nú tríggir mánaðir síðani, at Josef Hichersberger segði seg úr starvinum sum Eysturríkskur venjari. Síðani hevur hann ikki verið serliga nógv frammi við útsagnum um fótbólt, men tað tykist tó víst, at hann skjótt aftur verður at síggja sum fótbóltsvenjari.

Í vikuni gjørdi tíðindastovan, APA, samrøðu við venjaran, og her staðfesti Hickersberger, at dysturin móti Føroyum var ein orsøk til, at hann ikki longur er landsliðsvenjari. Og hann staðfesti eisini, at hann als ikki gleðir seg at síggja dystin í sjónvarpi.

- Tað fer heilt víst at vekja kenslur, líkamikið hvussu leikur fer. Og eg eri fegin um, at eg ikki eri partur av dystinum. Hatta var ein dystur, sum á ongan hátt hevði sína sjarmu fyri mítt viðkomand, og tí snýr tað seg kanska mest um at fyrireika meg til upplivingina. Tí eg havi ongan tørv á at verða mintur um tað, sum fyrifórst fyri 18 árum síðani. Sum so er tann dysturin heldur ikki áhugaverdur í sjálvum sær, men tapið ta ferðina er ein orsøk til, at eg ikki longur standi á odda fyri landsliðnum.

Men var tað bara tað, at tú vildi burtur frá Føroyum?

- Nei. Eg eri framvegis sannførdur um, at mín avgerð var góð fyri eysturríkska fótbóltssambandið, fyri liðið og fyri meg sjálvan. Sjálvur havi eg tað í øllum førum mundandi betur nú, og aldurin er eisini nakað, sum eg noyðist at taka atlit til.

Og hvat hevur tú nýtt tíðina til, síðani tú legði frá tær?

- Fyrst og fremst havi nýtt tíðina til at endurfinna meg sjálvan. Seinastu mánaðirnar havi eg fingist við ymiskt fyrifallandi og annars tikið tað róligt. Men tað er eitt alment loyndarmál, at eg fegin vil verða venjari aftur. Men tað skal vera stuttligt fyri sjálvan, so tað hevur týdning, hvat felag eg kann fáa møguleikan hjá.

Hvussu metir tú, at landsliðið er fyri í dag?

- Eg skal ikki døma men bert observera. Men eg vil gjarna siga tillukku við góðu úrslitunum móti Italia og Fraklandi, men sum dómari eri eg helst framvegis ov subjektivur, tá eg skal meta um landsliðið.

Á UEFA-kongressini fyri landslið varð sagt, at tendensurin nú er, at landsliðini spæla meira málsøkið. Sæst hetta eisini á eysturríkska landsliðnum?

- Tað er alt ov stutt fráliðið til at meta um tað. Liðið hevur bert spælt tríggjar dystir við Karel Brückner sum venjara. Og fyrst og fremst ræður tað hjá honum um at finna fram til, hvussu nógv liðið kann fara fram, uttan at verjan verður ov opin.

Eftir sigurin móti Fraklandi segði Marc Janko, at tú átti 50% av hesum. Hvussu stóran part heldur tú, at tú eigur av seinastu úrslitunum?

- Tað er altíð stuttligt, tá tú fært heiðurin av arbeiðinum hjá øðrum. Men so eigi eg helst eisini mín part í tapinum móti Litava.

Tá tú hyggur at tínum seinna tíðarskeiði sum landsliðsvenjari. Er so nakað, sum tú vildi ynskt, at tú hevði gjørt øðrvísi?

- Nei. Tí ætlan okkara var røtt. Tað var tørvur á einum ættarliðsskifti, og tað framdu vit. Kanska kanst tú siga, at vit høvdu ov sterk mótstøðulið í fyrireikingum okkara, og at vit tí vunnu ov fáar dystir. Men tú kanst bara læra frá teimum, sum eru betur. Hinvegin kundu vit kanska eisini valt onkrar dystir, har sannlíkindini fyri sigri vóru størri, tí áhugin fyri landsliðnum fellur, um tað er ov langt millum sigrarnar.

# Enn ein sigur til Gunnar

**Leygardagin bleiv kappast um FM heitið í MTB Cross Country. Í fagrasta veðri, í kanska fagrasta blettinum í Havnini bleiv tað til enn ein sigur til Gunnar Dahl-Olsen.**

SÚKKLING

*Tíðindaskriv*

Í samband við at kappast verður eisini í fjallasúkkling á Oyggjaleikum, hevur Tórshavnar Súkklufelag avgjørt eisini at skipa fyri FM í fjallasúkkling, ella MTB sum tað eisini verður kallað. Tvær MTB kappingar verður kappast um á Oyggjaleikum, og tí skipar TSF eisini fyri FM í tveimum MTB greinum, nevniliga Criterium og Cross Country.

Í Criterium verður koyrt í uml. 45 minuttir, altso uppá tíð, og í Cross Country verður koyrt ein ávísan tein, og súkklararnir skulu her út á ein hampuliga langan og stravnan súkklutúr, og skulu súkkla í uml. 2 tímar.

Síðsta vikuskifti bleiv kappast í FM í Criterium og leygardagin bleiv kappast í meistaraheitið í MTB Cross Country.

### Vakra økið í Hoydølum

Aftur hetta vikuskiftið bleiv FM kappingin hildin uppi við vakra økið kring Studentaskúlan í Hoydølum. Ein 4 km langur teinurin gekk gjøgnum viðalundina í Hoydølum, oman í gomlu Hoyvíkina og so út á Boðanes. Teir vaksnu súkklararnir skuldu súkkla henda tein tíggju ferðir og unglingar 5 ferðir.

Hetta var ein drúgvur túrur og menn løgdu tí varliga út. Men tá teinurin var súkklaður fýra ferðir hevði Gunnar Dahl-Olsen longu lagt seg á odda, og henda støða helt seg líka til kappingar enda. Andrass Joensen hevði ein góðan dag, og hóast hann ikki kappaðist á sínari egnu súkklu, men einari hann hevði lánt, megnaði hann at koma á mál bert smáar 10 minuttir eftir Gunnar. Triðjur á mál kom Høgni Øster. Hann brúkti 2 tímar og 33 minuttir um teir 40 kilometrarnar.

Hjá unglingum kappaðust tveir ungir harrar um sigurin. Hesir somu høvdu kappast síðsta vikuskiftið. Tá vann Jóanis Albert Nielsen á Benjamin og fleiri aðrar, men hesa ferð var tað Benjamin Thomassen, ið var fyrstur um málstrikuna.

Tórshavnar Súkklufelag hevur í ár skipað fyri fimm FM kappingum, og kappingin leygardagin var tann fimta og sostatt seinasta kappingin hjá TSF í ár.

**Úrslit, vaksin:**

| | | |
|---|---|---|
| 1. | Gunnar Dahl-Olsen, | 2.12.59 |
| 2. | Andrass Joensen, | 2.22.03 |
| 3. | Høgni Øster, | 2.33.12 |
| 4. | Kári Simonsen, | DNF |
| 5. | Sigmundur Olsson, | DNF |

**Úrslit, unglingar:**

| | | |
|---|---|---|
| 1. | Benjamin Thomassen, | 1 tíma 34 minuttir |
| 2. | Jóanis Albert Nielsen, | DNF |